## Hjálparvenjarin søkti Julian

Julian Johnsson og liðfelagarnir í FC Svendborg høvdu um vikuskiftið vitjan av Holstebro, sum hevði tapt báðar sínar fyrstu dystirnar í kappingini. Hesaferð syrgdi hjálparvenjarin hjá Holstebrø, Anders Staldsgaard, tó fyri, at hansara lið vann. Hann skoraði ikki minni enn trý mál í dystinum, sum Holstebro vann 4-2.



## Inter fekk bert javnleik

Meistaraliðið í Italia seinnu árini, Inter, fekk eina heldur keðiliga byrjan í Seriu A um vikuskiftið. Inter var á heimavølli ímóti uppflytarunum Bari, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Nýggi álopsspælarin hjá Inter, Samuel Eto'o, skoraði við brotssparki, men Vitali Kutuzov javnaði fyri Bari í seinna hálvleiki. Grannarnir hjá Inter, AC Milan, tosa hart um at vinna italska meistaraheitið í ár, og teir byrjaðu kappingina við sigri.

# VB/Sumba aftur á odda



**Gamli málrevurin, Súni Fríði Barbá, sum nú er venjari hjá B68 í 1. deild, spældi sjálvur í álopinum hjá toftamonnum, tá Skála vitjaði leygardagin**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Fakta

**TB-Víkingur 5-2 (1-2)**
**0-1:** Andras Mikkelsen
**1-1:** Gilli Sørensen
**1-2:** Hans Jákup á Reynatrøð
**2-2:** Dan Mortensen
**3-2:** Dan Mortensen
**4-2:** Dan Mortensen
**5-2:** Tórður Mortensen

**VB/Sumba-HB 5-3 (0-2)**
**0-1:** Jarleivur Hansen
**0-2:** Tony Rasmussen
**1-2:** Jón Krosslá Poulsen
**2-2:** Henning Joensen
**2-3:** Jógvan S. Nolsøe
**3-3:** Pól Thorsteinsson
**4-3:** Jón Krosslá Poulsen
**5-3:** Henning Joensen

**B68-Skála 1-1 (1-1)**
**1-0:** Kristian Anthon Andreasen
**1-1:** Rói Jacobsen

**FC Hoyvík-B71 0-1 (0-1)**
**0-1:** Mads Hentze

**MB-NSÍ 1-2 (0-2)**
**0-1:** Eyðstein Skipanes
**0-2:** Sonni L. Petersen
**1-2:** Ingi Ole-Jacobsen

**Við sigri á HB vann VB/Sumba oddasessin aftur frá havnarfelagnum, ið hevur uppflytingarkandidatarnar úr B71 og TB undir liðini á sær á stigatalvuni**




Hilmar Jan Hansen

Framvegis er ikki til at siga, hvørji lið verða uppflytarar úr 1. deild hjá monnum, tí har er ein nokk so jøvn kapping millum trý. VB/Sumba sær út til at hava bestu kortini á hondini og er eisini á odda, men ikki eru meira enn tvey stig niður til B71 og TB, ið eisini ætla at vinna sær uppflyting.

Merkisvert er, at HB støðugt blandar seg millum tey fremstu, eins og bæði B68, NSÍ og næstan eisini Víkingur liggja í nánd av toppinum, tí hetta eru alt lið hjá feløgunum, sum frammanundan eru umboðað í Vodafonedeildini, enntá millum tey allarfremstu har.

FC Hoyvík, sum eitt skifti var á odda, er dragnað nokk so fitt, men kann enn blanda seg, meðan niðurflytararnir av Skála spakuliga eru í ferð við at nærkast miðjuni eftir ein slakan start. Niðast er MB, ið ikki sær út til at hava teir stóru møguleikarnar, tí heili 16 stig eru upp til eitt pláss oman fyri niðurflytingarstrikuna.

### Málríkt í Suðuroy

Um vikuskiftið var enn eitt umfar í 1. deild, og her vístu suðuroyarfeløgini, VB/Sumba og TB, at tey í øllum førum eru ment at skjóta nógv mál, tí tey fingu fimm í part. Hinvegin eru verjurnar einki at reypa av, tí ímóti teimum fingu ávikavist HB og Víkingur trý og tvey mál.

VB/Sumba hevði heimavøll, tí HB ikki møtti til ein dyst suðuri í Vági í summar, og har stóð á gomlum nøglum. HB var á odda bæði 2-0 og 3-2, áðrenn tað eydnaðist VB/Sumba at seta seg á dystin og vinna.

Somuleiðis var TB aftanfyri bæði 0-1 og 1-2, sum eisini var hálvleiksstøðan á Sevmýri, áðrenn bilbukt fekst við Víking, ið at enda mátti lúta, tí TB vann heili 5-2.

### Mest í fyrra hálvleiki

B71 vann á útivølli 1-0 á FC Hoyvík, men hevði bæði spæl og møguleikar til mangt slíkt. Og so kundi tað enntá endað heilt galið hjá sandoyingum, tí FC Hoyvík ímóti endanum hevði skot á yvirliggjaran!

B68 og Skála samdust um javnleik á Svangaskarði í einum jøvnum dysti, ið var hendingarríkari í fyrra hálvleiki enn seinna. Bæði málini komu fyri steðgin.

Og í Miðvági fór NSÍ avstað aftur við øllum, tá tað eydnaðist at vinna 2-1 í einum dysti, har gestirnir vóru omaná fyri steðgin, men vertirnir í seinna hálvleiki, tá teir millum annað rakt stongina í yvirtíðini.

## Bestubitar úr 3. hálvleiki

Niðanfyri prentað vit nøkur av teimum mongu SMS'boðunum, sum komu inn til 3. hálvleik á Rás2. Besta boðið vann ein pakka av KitKat-ísum, og er hetta boðið prentað fyrst og í røðini

»HB spælir í Gundadali og AB í Mjørkadali«

»Gud segdi lat tad verda ljós... Hans á Lag segdi SPYR PENT!!!«

»Næsta summar verður tað lørdags pizza áðrenn dystirnar í klaksvík:-D«

»Lidini ur Eysturoy hava søkt um kommunalan utjavningarstudul, fyri at faa HB aftur.«

»Lysing frá skósøluni vid Gøtugjógv: Nyggir skógvar heimkomnir, serliga gódir til gummibein :)«

»Man Vikingur fara at vinna fair play prìsin-teir, hava latid øll botnlidini fingi 3 stig og harvid ikki gjørt mun à nøkrum«

»AB gjørt samstarvsavtalu við týska felagið Rot Weiss Essen«

»Eftirlýsing à Argjum, dòmarin burturblivin ì mjørkanum.:-D«

»..,- sådan skorer Nicolai«

»Tòrdur Thomsen fòr òdur av vøllinum, ti hann helt at AB tapti!«

»Utvarpid hevur uttanumtos og Ras 2 hevur mjørkatos«